# Royndu at bjarga leivdunum

**Ein av teimum, ið seldi mat í básunum á Summar Festivalinum, var matstovan Hvonn í Havn. Bjørt Kragesteen stóð og seldi mat við barrdiskin, tá hvirlan kom, sum fór við tjaldunum við matbásunum á Summar Festivalinum.**

SUMMARFESTIVAL
*Dánjal Hoydal*
*planet@sosialurin.fo*
*Mynd: Dagfinn Olsen*

- Knappliga fór alt uppfrá, og eg fekk barrdiskin omanyvir meg. Tað var nokkso ógvusligt, segði hon nakað skelkað. Men smílið var tó komið fram aftur, og hon kýtti seg nú við at rudda upp.

Nógv fólk komu at hjálpa til at taka leivdirnar av tjaldinum niður og bjarga tí, sum bjargast kundi. Matvørur, sodavatnsfløskur, papp og tallerkar flutu um alt, meðan fólk runnu aftur og fram til bilarnar við leysum og føstum – mest leysum.

Onkur meinti, at tað var ikki ráðiligt at standa undir koppaða tjaldinum og royna at bjarga mati, men fólk vóru røsk at hjálpa til, so skaðin ikki bleiv størri hjá matstovuni.



*Tey, ið selt høvdu ymiskt í mat- og skeinkiteltinum stríddust við at bjarga leivdunum*

*Mynd: Dagfinn Olsen*

# Stríddust við at bjarga útgerð

**Meðan stormurin leikaði í stríddust tøkningar við at taka niður alla ljóð- og ljósútgerðina á stóra pallinum.**

SUMMARFESTIVAL
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Størsta ljóðanlegg í Føroyum og alt pallljós í Føroyum umframt nógv, sum er flutt til Føroyar var sett upp á stóra pallinum á Vágsbøi í sambandi við størsta rokkshowið í Føroya søgu. Vatnið dreiv úr Hjalmari Hvítklett, stjóra á Ljóðtøkni, tá vit hittu hann við stóra pallin, har hann og hansara menn vóru í ferð við at taka útgerð niður. Hann lýstir teirra arbeiði sum ein bjargingarroynd.

Seinastu tríggjar tímarnar hava vit bara roynt at bjarga útgerðini, segði Hjalmar, ið rekur nógv størstu ljóðfyritøkuna í landinum og leverarar ljóð- og ljósútgerð til nærum øll tiltøk í landinum. Tá høvdu eitt nú lampurnar hingið í beinleiðis oysregnið í tríggjar tímar.

Fólk við tøkniligum innliti, ið Sosialurin hevur tosað við, meta tó ikki, at stórvegis av útgerðini hevur fingið skaða. Mest viðkvæma útgerðin varð beind burtur av pallinum, áðrenn dúkurin var tikin burt, og størsti parturin, ið var hangandi eftir var útgerð, ið bert skal sleppa at tornað, áðrenn hon verður tendra aftur. Hetta eru ivaleyst góð tíðindi fyri Fjarðafestivalin, ið verður um nakrar vikur.




*Palljósini hingu í tríggjar tímar í oysregni og vindi*

*Mynd: Jens Kr. Vang*